# BLAÐIÐ



FRAMHERJI

1. Deild - B68 v. HB - 02.06.20

# HÓPUR




SANDSHIP EST. 1949 · SP/F JMO · LANDA · FRAMHERJI · HF · KREA · HJÁ PIDDA

- 01. Nikola Stoisavljevic
- 02. Andrija Radovanovic
- 03. Ari Johannesen
- 04. Áki Johannesen
- 05. Aleksandur Ólavsson
- 06. Leivur Højgaard
- 07. Andri Benjaminsen
- 08. Dávur Matras Hansen
- 09. Esmar Clementsen
- 10. Zoran Vujovic
- 11. Bárður Ólavsson
- 12. Óli Højgaard Olsen
- 13. Jannik Mathias Olsen
- 14. Karstin Clementsen
- 16. Petur í Túni Petersen
- 17. Bergur Johannesen

# IN 2020



NJORD
EM Asfalt
Tel. 22 51 10 & 22 47 16
REYNI SERVICE
GC RIEBER
SJÓGÆTI
Fresh from Faroe Islands
TIMBUR TÆNASTAN
22 90 19

- **18.** Helgi Johannesen
- **19.** Tonni Jóhannus Thomsen
- **21.** Joakim Jürs
- **26.** Hjarnar Jákupsson
- **27.** Jákup Anthoniussen
- **29.** Fríði í Túni Petersen
- **39.** Búi Í Hjøllum

**Høvuðsvenjari:** Øssur Hansen
**Hjálparvenjari:** Aleksandar Jovevic
**Málmansvenjari:** Eyðun Petersen
**Liðleiðari:** Høgni Petersen
& Rani Hansen
**Mentalvenjari:** Jens C. Olsen
**Fitnessvenjari:** Remi Langaard



Mynd: Julia Clementsen

*Grein úr fótbóltsblaðnum 2020*

# B68 SKAL AFTUR HAVA LIÐ Í BESTU DEILDINI

Tað eru skjótt 30 ár síðani at Jógvan Norðbúð, sáli, førdi B68 til FM-heitið í Ábraham Løkin, Súni. Fríði Johannesen, Øssur Hansen og Jógvan Martin Olsen vóru málskjúttarnir, tá B68 við 4-2 sigri á NSÍ tryggjaði sær meistaraheitið.

Síðani hevur B68 í fleiri førum havt spennandi lið, sum hava sett sín dám á føroyskan fótbólt.Í 2003 bleiv liðið nummar trý, men flutti púra óvæntað niður í 2004. Hetta hevur tíverri verið ein lutur, sum toftafólk hava verið vitni til fleiri ferðir síðani.

Seinastu týggju árini hevur liðið flutt niður fleiri ferðir. Nú hava lokalu kreftirnar sett alt inn fyri , at Toftir aftur skal hava lið í bestu deildini í føroyskum fótbólti.

Tað er ongin loyna, at vit ætla at flyta upp í ár. Vit kenna á okkum, at vit sum felag hava ment okkum, og at vit hava eitt felag, sum kann flyta upp og verða verandi uppi, sigur Jóhannus Martin Olsen, formaður í B68.

Tað eru ikki nógvir lýsingarpengar í at spæla í 1.deild - tú fær heldur stuðulspengar. Eg haldi tey smáu feløgini eru afturútsigld. Tað er týdningarmikið at finna ein kappingarleist, sum gagnar øllum, sigur formaðurin í B68, nú hann ætlar sær upp aftur millum tey fremstu.

## ØSSUR STENDUR Á ODDA

Tað er við Øssuri Hansen sum høvuðsvenjara, at B68 aftur skal gera seg galdandi í føroyskum fótbólti. Hann hevur seinnu árini verið partur av emn-

narunum hjá Fótbóltsambandi Føroya, men nú er hann aftur í barndómsfelagnum, har meginparturin av hansara yrkisleið hevur verið.

Ætlanin er at fáa sum mest burturúr hópinum, ið vit hava. Vit hava lagt nógv fyri at gera umstøðurnar nfyri spælararnar so góðar sum gjørligt. Bæði við umstøðum, men eisini við venjarum. Vit hava sett Øssur Hansen sum høvuðsvenjara og vit hava ein hóp, sum vit hava stórt álit á, sigur Jóhannus Martin Olsen.

Tað hevur eisini verið ein ávís tilgongd í B68. Andri Benjaminsen og Óli Højgaard Olsen eru komnir aftur til felagið, meðan Jannik M. Olsen er komin úr NSÍ. Afturat teimum eru tríggir serbar í hópinum. Teir eru kmnir til landið í arbeiðsørindum og spæla síðani við B68.

Vit hava eisini fleiri ungar og lovandi spælarar. Við at seta Øssur Hansen sum høvuðsvenjara, so vóna vit eisini at síggja tað aftur á liðnum um nøkur ár, sigur formaðurin.

**LOKALI FÓTBÓLTSANDIN ER AFTUR**

Fyri einum ári síðani var útmeldingin ikki eins djørv. Tá skuldi B68 fóta sær og menna ungu spælararnar í hópinum, men tað var við framtíðini í huga. Nú er lokali fótbóltsandin aftur í hóma á Toftum, og tað merkist í B68.

Vit hava eina ríka fótbóltsmentan. Vit kenna á okkum, at lokali fótbóltsandin er aftur. Vit hava góða tilgongd av ungum spælarum og fleiri fólk bjóða seg fram at hjálpa sum venjarar og annað. B68-húsið er dagført. 50 fólk kunnu yvirnátta á ovastu hædd, salurin í miðhæddini er dagførdur og niðasta hædd er eisini dagførd, sigur Jóhannus Martin Olsen, ið heldur, at fólk hava góða tiltrúgv til fótbóltsframtíðina á Toftum.




Mynd: Julia Clementsen

*Spælarin hesaferð!*

# BÁRÐUR ÓLAVSSON




**Føddur: 07.05.01**
**Pláss á vøllinum: miðvallari**

**Hvat gert tú til dagliga? (arbeiði/skúli):**
*Búskaparbreyt, 2. Árið.*

**Hvussu gamal vart tú, tá tú byrjaði at spæla fótbólt?:** *Tá eg byrjaði at ganga.*

**Debut á besta liðnum hjá B68?:**
*2017, móti NSÍ á heimavølli. Vunnu 8-3*

**Vónir fyri fótbóltsárið 2020?:**
*Minsta uppflyting, helst vinna deildina.*

**Hvør er tín fyrimynd?:**
*Steven Gerrard og Messi*

**Besti leikari, tú hevur spælt saman við?:**
*Jann Ingi Petersen*

**Heimsins besti leikari?:** *Messi*

**Yndis seria?:** *The Office*

**Hevur tú nakra hobby?:**
*Eri sera musikalskur, og so dámar mær eisini væl at game'a.*

**Besti filmur?:** Ratatouille

**Hvør leikari í hópinum brúkar longst tíð frammanfyri speglinum?:**
*Helgi Johannesen*

**Hvør leikari í hópinum hevur best stýr uppá sítt outfit? (klædnastíl):**
*Kann ikki í tankar um nakran í hópinum beint nú, men um vit taka runt um hópin so sleppur man ikki undan at hugsa um Jákup Alfredsson.*

**Hvør leikari í hópinum hevur best teknikk? (bóltførleika):** *Eg havi best teknikk, men um eg skal velja ein annan, so er tað Tonni.*

**Helgi Johannesen var í blaðnum seinasta heimadyst. Hann vildi hava teg at svara uppá hetta: Hevur tú damu?:**
*Ja.*

**Hvør skal spyrjast næstu ferð, og hvat vilt tú hava at vita frá honum?:**
*Petur í Túni Petersen. Hvussu ofta keypir tú frá Farhatsa um vikuna?*


RADIO OG TV
NAUTISK ÚTGERÐ
BILRADIO
TELDUR
RADIOBÚÐIN
Trygg og álítandi tænasta í 57 ár
Heiðavegur 50-52 · Postsmoga 65 · 610 Runavík · Tel 448000 · rb.fo


NES KOMMUNA
Ein kommuna fyri øll

# STIGATALVAN

| # | Lið | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Víkingur | 4 | 3 | 1 | 0 | 10 | 4 | 6 | **10** |
| 2 | B68 | 4 | 3 | 1 | 0 | 8 | 3 | 5 | **10** |
| 3 | B36 | 4 | 3 | 0 | 1 | 7 | 4 | 3 | **9** |
| 4 | NSÍ | 4 | 2 | 1 | 1 | 12 | 8 | 4 | **7** |
| 5 | B71 | 4 | 1 | 2 | 1 | 5 | 5 | 0 | **5** |
| 6 | KÍ | 4 | 1 | 1 | 2 | 7 | 10 | -3 | **4** |
| 7 | FC Hoyvík | 4 | 1 | 1 | 2 | 6 | 10 | -4 | **4** |
| 8 | 07 Vestur | 4 | 0 | 3 | 1 | 6 | 7 | -1 | **3** |
| 9 | HB | 4 | 0 | 2 | 2 | 4 | 8 | -4 | **2** |
| 10 | AB | 4 | 0 | 0 | 4 | 3 | 9 | -6 | **0** |

## MÁLTINDURIN



# VIT ERU EISINI Á INSTAGRAM




NÆSTI DYSTUR
2008
VÍKINGUR
V.
B
68
Leygardagin 6.juni

FRAMHERJI



FRAMHERJI
SP/F JMO
SANDSHIP
EST. 1949
LANDA
GC RIEBER
KREA
TIMBUR TÆNASTAN
22 90 19
EM Asfalt
Tel. 22 51 10 & 22 47 16
SJÓGÆTI
Fresh from Faroe Islands
REYNI SERVICE
HJÁ PIDDA
NJORD